# Fiskivinnugransking í Føroyum

*Egil Olsen, fiskivinnufrøðingur, skrivar*

Í samband við útgávu av serblað um fiski og oljuvinnuna, hevur Sosialurin heitt á meg at skrivað eina grein um fiskivinnugransking í Føroyum.

Í greinini fari et bera fram míni sjónarmið, um, hvussu eg haldi, at fiskivinnugranskingin í Føroyum frægast kann skipast, eftir teimum menniskjansligu og fíggjarligu karmum, sum eru í føroyska samfelagnum.

## Hvat er gransking?

Í hagfrøðiligum høpi, nýta OECD-londini hesar leiðreglur fyri at skilmarka (definera) hvat gransking er:

***"Gransking kann skilmarkast sum skipað skapandi arbeiði, fyri at økja um ta vísindaligu og teknisku vitanina og brúka hesa vitan til at vísa á verkliga nýtslu".***

Skilt verður vanliga ímillum tvey sløg av gransking:

- Grundgransking
- Nýtslugransking

Grundgransking eru uppruna kanningar sum hava til endamáls at fáa fram nýggja vísindaliga vitan og fatan. Hon er ikki beinleiðis rættað ímóti verkligum málum ella nýtslu.

Nýtslugransking eru uppruna kanningar, har denturin verður lagdur at útvega nýggja vitan og fatan. Hon er beinleiðis rættað móti verkligum málum ella nýtslu, og vinnan hevur ein virknan leiklut í granskingini.

## Er neyðugt við fiskivinnugransking í Føroyum?

Eg haldi avgjørt at tað er neyðugt við fiskivinnugransking í Føroyum.

Føroyska samfelagið verður borið uppi av teimum inntøkum, sum fiskivinnan á sjógvi og landi skapar. Meir enn 90% av føroyska heildarútflutninginum kemur frá fiski og alivinnuni. Sjálvt um talið av fólki sum starvast í sjálvari vinnuni ikki er so stórt, so er tað avleidda virksemi av fiski- og alivinnuni sera stórt.

Vit sóu í kreppuárunum hvussu alt samfelagið ávirkaðist av tí negativu gongdini í fiskivinnuni.

Vit síggja í dag hvussu alt samfelagið ávirkast av tí positivu gongdini í fiski og alivinnuni.

Eitt samfelag sum er so bundið av fiskivinnuni, má hava gransking innan fiskivinnu. Tí:

- vit mugu alla tíðina fáa sum mest burturúr okkara fiskatilfeingi.
- vit mugu alla tíðina kenna tørvin hjá okkara kundum, soleiðis at vit framleiða tær vørurnar, sum geva teir bestu prísirnar til virki og samfelag
- vit mugu framleiða okkara vørur soleiðis, at tær eru á einum jøvnum og høgum góðskustøði.
- vit mugu framleiða okkara vørur til kappingarførar prísir
- karmar og lógarverk mugu vera optimal í mun til ta tíð og ta vinnuliga umhvørvið ein er partur av

Fyrst og fremst er íløga í gransking, ein íløga í okkara framtíðar kappingarføri mótvegis øðrum londum. Hetta er ein íløga í okkara framtíðar vinnuførleika.

Í eini tíð, har fría kappingin ræður, har broytingarnar henda skjótari enn nakrantíð, er tað sera umráðandi altíð at verða kappingarførur mótvegis kappingarneytunum.

Vit mugu staðfesta at enn er tað lítið av fiskivinnugransking ið fer fram í Føroyum sammett við onnur lond, sum t.d. Noreg og Ísland. Lítið av hesi gransking hevur beinleiðis vinnuligan týdning.

Nakað av gransking fer fram á Fiskirannsóknarstovuni og er tað mest lív - og vistfrøðilig gransking.

Harumframt fer lívfrøðilig gransking fram, á Biofar í Kaldbak. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur eisini luttikið í onkrum norðurlendskum verkætlanum t.d. innan vatn og Listeria.

Granskingadepilin fyri Økismenning, hevur eisini verið við í altjóða verkætlanum um alivinnu og tikið alneyðuga rekrutteringsspurningin til viðgerðar. Granskingadepilin, skipar í komandi mánað fyri ráðstevnu um rekruttering av høgt útbúnari arbeiðsmegi til fiski og alivinnuna.

Felags fyri tað av fiskivinnugransking sum fer fram í Føroyum í dag, er at tað enn er lítið av hesi gransking, sum beinleiðis gevur vinnulig árin.

Tann tøkniliga menning av fiskivinnu og alivinnu í Føroyum, er fyri tað mesta komin eitt úrslit av gransking - men útlendskari gransking. Føroyingar hava verið rættuliga dugnaligir at brúka útlendsk granskingarúrslit fyri at menna fiski og alivinnuna. Vandin við eini slíkari "kopiering" er, at táið hendan er framd, hava kappingarneytarnir t.d. tikið aðra tøkni í brúk ella framleiðslu.



*- Fiskivinnugranskingin eigur partvís at verða fíggjað við almennum pengum og partvís frá vinnuni sjálvari. Vinnan kundi t.d. latið eitt ávíst gjald av útflutninginum sum varð markað til gransking, menning og marknaðarføring, sigur Egil Olsen, Fiskivinnufrøðingur*

Samstundis er nógv útlendsk vinnugransking vard og úrslitini koma ikki fram fyrr enn rúm tíð er farin.

Hetta ger, at tað er neyðugt hjá føroyingum sjálvum at granska. Ì granskingini mugu vit læra at avmarkað okkum og seta brennidepilin á nøkur ávís umráði sum t.d. matframleiðslu, havfrøði, biotøkni, kunningartøkni, nýskapan, kappingarføri og almennar reguleringar.

Tað eru hend nógv framstig innan vinnuliga fiskivinnugransking í Føroyum, serliga tey síðstu tvey árini. Síðan FMR setti ein dugnaligan fiskivinnusamskipara, at taka sær av samskipanini av fiskivinnugranskingini, umvegis Fiskivinnuroyndir, eru hend stór framstig. Granskingarøkini er raðfest fimm ár fram og tann vinnuligu parturin av umsóknunum til Fiskivinnuroyndir er vaksandi.

Samstundis verður arbeitt í løtuni við at fáa trinnar granskingardeplar at virka, innan ávíkavíst evnafrøði og biotøkni, veiðu og reiðskapstøkni og virkingartøkni. Ein programmnevnd mannað við fólki við førleika innan tey ymisku fakøkini, skal stinga útí kortið, hvørjar granskingarætlanir, farast sum skulu undir tey komandi 3-5 árini. Vinnan er eisini væl umboðað í programmnevndini.

Ætlanin er eisini við samstarvi millum granskingarkjarninar og skipanina við vinnugranskararum, sum eru beinleiðis knýttir at virkjunum. Eg síggi eisini granskingardeplarnar, sum sambindingarlið ímillum vinnuna og útlendskar granskingarstovnar og vinnufyritøkur sum arbeiða innan sama fakøki.

Granskingarkjarnin innan evnafrøði og biotøkni skal halda til á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og hinar báðar kjarninar á Fiskirannsóknarstovuni.

Eg haldi at tað er stórt spell, at man ikki eisini setti á stovn, ein granskingardepil innan tilfeingisumsiting og búskap. Hesin kjarnin kundi arbeitt við og lýst samfelagsbúskaparlig og organisatorisk viðurskifti t.d. í samband við fiskidagaskipanina. Hesin granskingardepilin hevði nátturliga verið kýttur at Granskingardeplinum fyri Økismenning, tí depilin hevur uppbygt sær førleika innan hetta øki.

## Er førleiki innan fiskivinnugransking í Føroyum?

Føroyska samfelagið hevur eitt vælútbúgvið fólk. Rættuliga stórur partur av fólkinum nema sær hægri lestur uttanlands serliga í Danmark.

Um hugt verður eftir, hvar tey høgt útbúnu fólkini enda eftir lokið prógv, er tað serstakt fyri Føroyar. at tey flestu fáa starv í almenna sektorinum, meðan bert tey heilt fáu fáa sær starv í privatu vinnuni.

Hví hetta er so, er ikki so lætt at greiða frá, og tað er heldur ikki ætlanin við hesi grein.

Vit mugu bara staðfesta at tann mesti heilakapasiteturin "**Brainware**" í samband við granskingar-førleika í Føroyum, er í almenna sektorinum.

Um mest skal fáast burtur úr gransking í Føroyum, sæð útífrá einum vinnuligum sjónarmiði, er tað sostatt neyðugt við sera góðum samstarvi ímillum almenna sektorin og tað privata vinnulívið. Hetta krevur virðing frá báðum pørtum og tað krevur ikki minst, at møguleiki er fyri ikki vanabundnum samstarvsloysnum tvørtur um sektorar og (møguliga) eisini fakmørk.

Um ikki hetta letur seg gera, eri eg bangin fyri at tann "**Brainware**", sum vit eiga í almenna sektorinum, verður til "**Drainware**", av tí at tær fakligu avbjóðingarnar verða ov lítlar, við tí vanda at fólk sovna burtur, ella stinga í sekkin, og finna sær avbjóðingar aðrastaðni enn í Føroyum.

Stór verklig vitan er ímillum fólk sum dagliga starvast í tí føroysku fiski- og alivinnuni. Fiskivinnan er so stórur partur av tí lokala samfelagnum og ávirkar so stórar partar av gerandisdegnum hjá føroya fólki, at sera góður gróðrarbotnur er fyri mennandi kjaki um viðurskifti, sum viðvíkja hesum vinnum.

Granskingar avbjóðingin liggur tískil í at samskipa hesa vitan og at seta hana saman við servitan á ymiskum økjum, fyri harvið at fáa ítøkilig verklig úrslit burtur úr .

## Hvat fyri fiskivinnugransking skal verða og hvussu kann hon skipast?

Undirritaði er av tí áskoðan, at tann fiskivinnugransking, sum vit skula hava í Føroyum, í mest møguligan mun skal verða gransking sum miðjar eftir góðum vinnuligum úrslitum.

Bæði tað fíggjarliga og menniskaliga tilfeingið er avmarkað og tí eigur orkan at verða løgd á granskingarøkir sum í mest møguligan mun eru til gagns fyri tað føroyska samfelagið.

Granskingarverkaætlanir eiga at verða gjørdar í tøttum samstarvi við vínnuna og í mest møguligan mun úti á teimum virkjum, sum eru við í teimum einstøku verkaætlaninum. Mínar leiðsluroyndir gjøgnum 15 ár, hava sannført meg um, at har granskarar og virki arbeiða tætt saman, fæst mest burturúr, tí tann praktiski førleikin sum starvsfólkini hava frammanundan, hjálpa væl til at náa góð, verklig úrslit. Við at verða úti á virkjunum, fáa granskarnir eisini betri fatan hvat sum er mest átroðkandi og lønandi at granska.

Ein spurningur sum sjálvandi skal svarast í samband við fiskivinnugransking, er, hvør skal gjalda.

Eg haldi at fiskivinnugranskingin eigur partvís at verða fíggjað við almennum pengum og partvís frá vinnuni sjálvari. Vinnan kundi t.d. latið eitt ávíst gjald av útflutninginum sum varð markað til gransking, menning og marknaðarføring. At vinnan sjálv er við í fíggingini, økir eisini um áhugan hjá vinnuni at fáa ítøkilig úrslit burturúr granskingini.

Hvussu nógv, hvør partur skal gjalda, má eisini síggjast í mun til, hvørjar verkaætlanir talan er um og, hvussu avmarkandi tær eru.

Spurningurin er eisini, um tann játtan sum Fiskivinnuroyndir árliga fær á fíggjarlógini, bert skal markast vinnufyritøkum. Stuðul til almennar stovnar kann latast um verkætlanir verða gjørdar saman við vinnufyritøkum.

Í Íslandi er fiskiídnaðargranskingin knýtt at Rannsóknarstofu Ìdnaðarins (RF), sum heldur til í sama bygningi sum Havrannsóknarstovan og Fiskimálaráðið. RF er ein óheftur granskingarstovnur undir Fiskimáláráðnum. Hann varð stovnsettur við lóg í 1965 men hevur virkað síðan 1934. Fíggjarætlanin er umleið 40 mio. kr og umleið 70 fólk starvast á stovninum.

Tað almenna fíggjar umleið ein triðing av RF, norðurlendskir- og ES grunnar fíggja ein triðing og tann síðsti triðingin fíggjar vinnan fyri granskingaruppgávur og tænastuveitingum til vinnuna.

Virksemi á RF er skipaði fimm deildum:

1. Granskingardeildin, sum tekur sær av gransking innan matvørur, góðsku, framleiðslur, kunningartøkni og marknaði
2. Kanningardeildin, sum bjóðar tænastur til vinnuna og granskingarumhvørvið. Kanningardeildin hevur kanningarstovur á 5 støðum í Íslandi
3. Ráðgevandi deildin, sum bjóðar ráðgeving til vinnuna innanlands og uttanlands. Ráðgevingin umfatar t.d. rávørustýring, góðskueftirlit, HACCP, vørumenning og framleiðsluplanlegging
4. Kunningardeildin hevur ábyrgd av at almannakunngera granskingarúrslit og annað vinnu- viðkomandi tilfar frá stovninum. Harumframt skipar deildin fyri skeiðum til veiðu og framleiðsluliðið og annan matvøruídnaðin
5. Fyrisitingardeildin tekur sær av dagliga rakstrinum av stovninum

RF arbeiðir tætt saman við Lærda Háskúla Ìslands í Reykjavík og Lærda Háskulan á Akureyri um gransking og undirvísing innan matvøruvísind og fiskivinnuvísind.

Bygnaðarliga skipanin í RF, kundi verið ein góð fyrimynd fyri, hvussu matvørugranskingin í Føroyum kann skipast í framtíðini. Vinnan í Ìslandi, tekur sera væl undir við tí arbeiði sum gongur útífrá RF, og nógvar vinnuligar verkaætlanir eru skaptar í tøttum samstarvi millum RF og vinnufyritøkur.

Tær drívandi kreftinar innan menningina av biotøkniskari vinnu í Ìslandi, eru granskarar frá Lærda Háskúla Ìslands, saman við vinnuligum kreftum. Hetta vísir, hvussu týdningarmikið tað er at byggja brýr í millum tað almenna fólkatilfeingið og vinnuna sjálva.

Tann sum annars vil fáa meir at vita um RF, kann vitja heimasíðu teirra. www.rf.is

Eg skal at enda koma við fýra dømum um áhugaverdar og eisini átroðkandi vinnurættaðar granskingaruppgávur innan fiskivinnuna í Føroyum:

- Hvussu skulu vit bera okkum at fyri at ala longri til havs? (tøkni, búskapur vm.).
- Tilgongd (rekruttering): Hvussu tryggja vit okkum støðugt og nýtt starvsfólk til fiski- og alivinnuna?
- Betri gagnýtsla av fiskatilfeinginum: Hvussu fáa vit lønandi virksemi burtur úr tí rávøru sum í dag ikki kemur til lands og, hvussu fáa vit hækkað virði burturúr hjáframleiðslum.
- Fiskidagskipanin - sæð frá einum vísindaligum sjónarmiði,- kunnu onnur læra av okkum.

Granskingin er neyðug longu ídag.

Granskingin verður uppaftur neyðugari í einum føroyskum sjálvberandi fiskivinnubúskapi.



*Vit mugu bara staðfesta, at tann mesti heilakapasiteturin í samband við granskingar-førleika í Føroyum, er í almenna sektorinum, sigur Egil Olsen*

*Savnsmynd*



*Í Føroyumer lítið av fiskivinnugransking, sammett við onnur lond, sum t.d. Noreg og Ísland. Lítið av hesi gransking hevur beinleiðis vinnuligan týdning*

*Savnsmynd*